# MEIRA ENN BERT EIN LEKKUR YVIRKROPPUR

Mammurnar hjá vinkonunum spyrja, um eg enn havi líka lekran yvirkropp, fortelur 19 ára gamli Jóannes Lamhauge, sum hevur upplivað, at konufólk skríggjaðu, tá hann lat seg úr dreymakotinum



**Niels Uni Dam**
**nielsuni@sosialurin.fo**

Jóannes Lamhauge vann í summar heiðurin sum Ársins Songrødd. 19 ára gamli havnarmaðurin er greiður yvir, at sigurin setir krøv. Stórar songrøddir, sum Guðrun Sólja Jacobsen og Eivør Pálsdóttir hava brúkt Ársins Songrødd, sum lopfjøl til at gerast yrkissangari. Jóannes tímir væl at gerast yrkissangari, men stendur á gáttini til at skula velja livsleið, og ymsar leiðir toga ymsar vegir.

**Til Fraklands**
Studentaskúlaprógvið er júst komið í hús, og Jóannes skal avgera, um hvar hansara lesnaður skal halda fram. Aftan nýggjár gongur leiðin væntandi til suður Fraklands til Aix en Provence, ið liggur stutt frá havnarbýnum Marseille. Hann kallar hetta eina pílagrímsferð. Hansara yndislistamaður Paul Cézanne hevði atelier í Aix en Provence, tí gongur leiðin hagar. Ætlanin er at taka eitt málskeið fyrsta hálva árið og síðan avgera, hvat skal henda.

**Myndlistin dregur**
Jóannes er eisini myndlistamaður, og hann hevur á námsferð við studentaskúlanum vitjað Aix en Provence. Honum dámar sera væl býin og vil fegin aftur. Hann sigur seg vera fullkomiliga frankofilan - Hann elskar alt tað franska. Seinastu trý árini hevur hann havt franskt í skúlanum, og hann gleðir seg til at læra meira um málið, fólkið og mentanina.

Rólant í Skorðini hevur verið fransklærari hjá Jóannesi tey trý árini á studentaskúlanum. Hesir tímar hava givið nógvan íblástur, ofta hava fraklendingar og fransktalandi annars verið gestir í tímunum. Ein tíma var Marjun Vatnhamar, ein ung føroysk kvinna, sum læs á einum listaskúla í París, og vitjaði. Seinni fóru tey, sum høvdu franskt til París saman, og tey vitjaðu listaskúlan hjá Marjun. Jóannes helt skúlan vera sera áhugaverdan. Hann hevur møguleika at sleppa inn á skúlan um hann hevur hug, og hetta er ein møguleiki.

Jóannes er ein sera gávuríkur listamaður, og hansara eyðsýndu gávir góvu honum 13 í árskarakteri í evning á Studentaskúlanum. Hetta letur nógvar dyr upp. Hann heldur, at París er ein spennandi býur, eitt satt listanna Mekka, og tað kann hugsast, at leiðin gongur tann vegin aftan á eitt hálvt ár í suður Fraklandi.

Í løtuni savnar Jóannes pening til ferðina, hetta verður fyrst og fremst gjørt við at mála, ætlanin er so at hava nakrar sølu-framsýningar. Eisini skrivar hann um list í Skáanum.

**Sangurin dregur eisini**
Hann sigur seg eisini hava hugsa um at lisið til arkitekt ella kanska paleontolog ella arkeolog. Møguleikarnir eru nógvir, men enn hevur hann ikki tikið nakra avgerð. Ein møguleiki er hægri lesnaður innan sang. Serliga nú hann er vorðin Ársins Songrødd. Song fyrimyndirnar eru ikki tær vanligastu fyri ein 19 ára gamlan drong: Alessandro Safina, Josh Groban, Andrea Bocelli og Ernst Sondum Dalsgarð. Við leiklutinum, sum Jósef í sangleikinum Jósef og hitt ótrúliga litfagra dreymakotið, vísti Jóannes føroyingum, at hann hevur eina frálíka rødd, sum egnar seg sera væl til musikalir. Hetta sama vísti hansara tolking av "When you say you love me" í ársins songrødd finaluni. Hann fortelur eina søgu við sanginum, og hevur stóra innliving í bæði tekst og lag. So nógva innliving, at tú trýrt honum.

**Lekran yvirkropp**
Men tað er ikki bara røddin og listargávurnar, sum eru góðar. Jóannes er ítróttarmaður, og er væl trenaður, hetta kom til sjóndar í Jósef og hitt ótrúliga litfagra dreymakotið. Í leikinum letur Jósef seg úr dreymakotinum, og stendur við berum yvirkroppi. Jóannes greiður frá, at tá hann lat seg úr, hoyrdi hann, eitt suð fara í gjøgnum allan salin í Norðurlandahúsinum, og so byrjaðu konufólkini at skríggja. Hann heldur tað vera nokkso stuttligt. Onkur konufólk samanbóru hann við ein griskan guð.

Hann upplivir eisini enn, at vinkonir fortelja, at mammurnar hjá teimum hava spurt, um hann enn hevur líka lekran yvirkropp.

**Egin løg**
Jóannes var í finaluni í Singer/Songwriter kappingini í Hafnia Lounge í fjør. Hann hevur skrivað løg í fleiri ár, og hevur havt nøkur liggjandi í skuffuni, men var ikki vanur at spæla tey alment. Tí vóru nervarnir øgiligir, tá hann fór á pallin í Lounge'ini. Hann kendi seg naknan. Hetta hóast, at har vóru nógv færri fólk enn til Dreymakotið. Hann sigur munurin var, at í Norðurlandahúsinum, var tað ikki Jóannes men Jósef, sum stóð á pallinum, tí vóru nervarnir ikki so ringir. Í Lounge hevði hann ongan leiklut at goyma seg aftan fyri, hann var berur.

Eisini vóru nógv av teimum í Lounge'ini slettis ikki áhugaði í tónleikinum, men bara komin fyri at ballast, tað kendist løgið at skula spæla fyri fólki, sum ikki tímdi at lurta.

Hann heldur annars Singer/Sonwriter kappingina vera eitt tað besta tiltakið, ið er í Føroyum. Luttakararnir eru so øgiliga ymiskir, t.d. vóru m.o. Rókur Jakobsen, Kári Páll Nolsøe og Ragnar í Vík við í fjør. Jóannes var serliga stoltur av, at hava vunnið á Ragnar í Vík, sum júst hevði verið í Nashville og sungið.

Hann hevur meldað seg til aftur í ár. Men gravgangurin var so stórur eftir at luttaka, at hann einans er sloppin á bíðilista. So hann sleppur bert at luttaka um onkur meldar avboð.

Jóannes spælir umframt gittar, klaver og trompet. Hann sigur, at gittarin er hansara besti vinur, og at hann hevur skrivað eina rúgvu av løgum. Dreymurin er, at gera eina fløgu onkuntíð, og heitið ársins songrødd setur nøkur krøv.

**Ársins Songrødd**
Jóannes heldur ikki at karmarnir fyri Ársins Songrødd eru serliga hepnir, støðið er høgt, og nógvir góðir sangarar syngja av heilum hjarta, men fyri áskoðararnar er hetta eitt ball. Hann heldur at ein sitikonsert hevði verið meira passandi til eitt tílíkt tiltak. Eisini hevði ein eldri lurtaraskarði fingið áhuga fyri tiltakinum, um karmarnir vóru annarleiðis.

Í høvuðsuppgávuni í evning á studentaskúlanum, gjørdi Jóannes millum annað eitt kórverk. Hann sigur seg droyma um, at fáa Sunnleif Rasmussen og Tarira at framføra verkið.

Nógvir eru dreymarnir, og evnini eru stór. Tað verður spennandi at fylgja við, hvat framtíðir hevur at bjóða Jóannesi.